# Matur, dansur og festivaltónar

**Jóansøkufestivalurin fer av bakkastokki leygardagin og alt tykist ganga væl við fyrireikingunum til fyrsta jóansøkufestivalin, ið hevur góðan tónleik, góðan mat og góðan dans aftaná festivalin at bjóða**

FESTIVALUR
*dagfinn@sosialurin.fo*

Jóansøkufestivalurin fer nú inn í fyrireikingarvikuna av álvara og festivaldagurin nærkast. Men alt gongur væl við fyrireikingunum til festivalin, sum verður í skúlagarðinum á Tvøroyri, sum verður skrýddur og gjørdur nýtiligur til endamálið.

Umframt góðan tónleik frá AS Sweet, Nylon, Makrel, Deja Vu, The Dreams, Paradox, Guðrun og eini rúgvu av øðrum føroyskum tónleikarum, verður góður matur og drekka at fáa á festivaløkinum, siga fyrireikararnir.

Festivalurin verður skipaður við tveimum pallum, einum stórum og einum minni palli. Eftir stóra festivaltiltakið, verður dansur í høllini í Trongisvági, at tiltikni bólkurin Revival fer á pallin, og teir borga fyri lívligum dansi. Bussar koyra eftir festivalin til dansin.

Forsølan av atgongumerkjum er byrjað og fáast tey á kunningarstovunum í Suðuroynni, í Tangabúðini, á Flogvøllinum, á Fjørukrønni í Vestmanna og á Statoilstøðunum í Klaksvík, Saltangará, í Gundadali, á Tvøroyri og í Vági. Heimasíðan hjá Jóansøkufestivalinum er nú virkin og eitur hon www.joansokufestivalurin.com

# Nobel virðisløntur yrkjari á Listastevnuni

Írski yrkjarin, Seamus Heaney, ið vann Nobels viðursløn innan bókmentir í 1995, og Liam O'Flynn, tann altjóða viðurkendi "uilleann piper" spælarin, verða at hoyra á Listastevnuni í ár.

Hetta verður einasta framførslan hjá teimum í 2005, hetta bert av tí at teir báðir hava djúpan persónligan áhuga í Føroyum. Síðsta ár í mai vóru teir báðir og framførdu ymsa staðni í Íslandi, og henda ferðin eydnaðist sera væl. Tó iðraðu teir seg um, at tað ikki lá fyri at koma til Føroyar. Men nú verður tað so!




Verkætlanin, ið Seamus Heaney og Liam O'Flynn fara at framføra í Føroyum, kallast "The Poet and The Piper", og her fer Seamus Heaney at lesa yrkingar aftur við pípuspælinum hjá Liam O'Flynn.

Yrkingarnar hjá Seamus Heaney bera dám av persónligum minnum, og eru merktar av hansara írska arvi og landslagnum í Norður Írlandi. Tann "uilleann" pípan, sum Liam O'Flynn spælir uppá, er ein keltisk sekkjapípa, lík tí skotsku. Ein munur á teimum báðum er tó, at uilleann pípan er betri hóska til inndura spæl.

Teir báðir hava arbeitt hart fyri at fáa yrkingarnar hjá Heaney og spælið hjá O'Flynn at passa saman á rætta hátt. "Tað er ein yndislig, dugnalig framførsla, ið er verd at lurta eftir ferð aftan á ferð," verður sagt um fløguna, ið teir hava spælt inn saman www.claddaghrecords.com

Seamus Heaney og Liam O'Flynn spæla í Norðurlandahúsinum 8. august kl. 19.30. Fleiri upplýsingar um Listastevnuna eru at fáa á www.listastevnan.com

# Jóansøka í Vestmanna

Eitt av tiltøkunum, sum Vestmanna Ítróttarfelag skipar fyri, og sum eftirhondini er vorðið ein fastur táttur, er jóansøkubálið á sandinum inni á Fitjum.

Soleiðis verður aftur í ár! Viðrar leygardagin 25. juni skipar Vestmanna Ítróttarfelag fyri jóansøkubáli við hesi skrá:

- Ponyríðing verður frá kl 1700
- Annars verður byrjað kl 1800
- Pylsur verða grillaðar _ eisini fæst okkurt leskandi
- Sungið verður úr grønu sangbók
- Lutaseðlar verða seldir Nógvir góðir vinningar, m. a. uttanlandsferð, gávukort og útferðir
- Kl 19:30 heldur Karl A. Olsen, borgarstjóri, røðu.

Bálið verður tendrað kl. 20 ella seinni, sigur Vestmanna Ítróttarfelag.

SKOTLAND





4 - 8 august 2005

## Urtagarðstúrur til Aberdeen

Vitja verður í ymiskum urtagarðum í Aberdeen og í størri parkum og slottum uttan fyri býin. Gist verður á hugnaliga trý-stjørnu hotellinum Brentwood Hotel, sum liggur á Crown Street, ein síðugøta til Union Street. Ferðaleiðari verður Eva Andersen.

Fyri hvønn í dupultkamari
**Kr. 3.415,-**
**Í einakamari kr. 3.850,-**

**Íroknað er:** flogferð við avgjøldum, gisting í 4 nætur við morgunmati, bussur til/frá flogvøllinum, heildagsútferð til ymisk slott, ferðaleiðari allan túrin. **Ikki íroknað:** atgongugjøld til einstøk støð, ferðatrygging.

**Bóking á 34 10 10 í seinasta lagi 18. juli 2005**

**Fá meira at vita á:**
www.brentwood-hotel.co.uk
www.agtb.org (um urtagarðar)
www.atlantic.fo

Vanligir ferðaseðlar kunnu keypast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.flyfaroe.com

## Móttøka

**í samband við síðsta skotið fyri Norðoyatunlinum**

Síðsta skotið fyri Norðoyatunlinum verður leygardagin 25. juni kl. 17.00

Almenn móttøka verður í høllini á arbeiðsplássinum við Borðoyarvík kl. 16.15



NORÐOYATUNNILIN

Norðoyatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postsmoga 1010 · 110 Tórshavn
Tel 350200 · Faks 350201 · www.tunnil.fo